

# Siri gleðir seg til Nephew

**Navn:** Siri Hansen
**Búðstaður:** Albertslund, Danmark
**Starv:** Lesi til stud. pæd. soc. á DPU

*Hvat skal summarið hjá tær brúkast til?*
Eg ætli mær til Føroyar í summar at arbeiða. Ikki alt er komið upp á pláss enn hesum viðvíkjandi, men eg vóni tað besta. Summartíðin í Føroyum skal eisini nýtast til at vitja familju, vinfólk, samstundis sum eg skal á G!-festival og í brúdleyp.

*Hvat við summarinum í Danmark?*
Eg skal m.a. á fleiri konsertir. Tann fyrsta verður longu um tvær vikur, tá Linkin Park vitjar Keypmannahavn. Í Juni skal eg á konsert við bæði Tori Amos og Justin Timberlake.

Annars ætli eg mær at fáa so nógva sól í Danmark sum møguligt í summar, tí eg vænti ikki ov nógv av veðrinum í Føroyum. Eitt fríluftsbað letur upp her í Albertslund tann 26. mai, so tað fari eg heilt sikkurt at royna.

*Hvat gleðir tú teg mest til í summar?*
Tað er at síggja vinfólk og familju aftur. Eg skal síggja eina av mínum vinkonum sum gifta kvinnu fyri fyrstu ferð í summar. Hon giftist í gjár (12. mai), og eg hevði tíverri ikki stundir at verða í Føroyum um vikuskiftið.

Eg havi annars føðingardag tann 27. juli. Eg plagi altíð at vera í Havn á ólavsøku henda dagin, men kanska eg fari at halda hann í ár fyri fyrstu ferð í eini 15 ár. Afturat hesum ætli eg mær eisini á G!. Tað hevur longu bjargað G!, at Nephew verður partur av festivalinum




















